# Glað og sunn børn



*Lagið var gott og pulsurin høgur, tá børnini á Argjum hugnaðu sær við leiki og ítrótti á vøllinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Fríggjamorgunin skipaðu Dagstovnurin á Argjum, Dagstovnurin Løkjatún og Dagstovnurin á Haminum fyri felags ítróttardegi á AB vøllinum. Skipað varð fyri upphiting, kapprenning og undirhaldi frá klovninum »Atjú«**

BØRN OG HEILSA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Við íblástri frá heilsuvikuni valdu dagstovnarnir á Argjum at skipa fyri einum felags ítróttardegi fyri børn, starvsfólk og leiðarar á fótbóltsvøllinum á Argjum.

- Vit hava tosað leingi um at samskipa okkurt millum dagstovnarnar á Argjum, men ofta vísir tað seg at verða ringt at koma frá tosi til handling. Tá so heilsuvikan nú er hesa vikuna, fingu vit hugskotið til at skipa fyri felags ítróttardegi, so tað má sigast at hetta hevur ikki verið fyrireika leingi, sigur Majbritt Jacobsen, sum er varaleiðari á dagstovninum Løkjatún

## Góð undirtøka

Henda verkætlanin hevur ikki verið fyriskipa leingi, men tað vísti seg skjótt at tað var stórur uppbakningur rundanum hetta.

- Bæði børnini og starvsfólkini eru ordiliga við uppá tað, og tey eru sera spent eisini. Vit eru so heppin, at vit hava tvær fimleikagentur, sum arbeiða hjá okkum, og so fingu vit tær at standa fyri upphitingini. Afturat tí hava vit so fingið klovnin »Atjú« at gera tað meira stuttligt, greiðir Majbritt Jacobsen frá.

Umleið 160 børn vóru komin saman á vøllinum á Argjum, og tað var eyðsýnt at tey vóru glað og spent uppá henda ítróttadagin, og við teimum vóru umleið 30 leiðarar og starvsfólk.

## Góð heilsa og samanhald

Umframt at hetta er eitt heilsuátak fyri børnini, er hetta samstundis ein góður møguleiki hjá starvsfólkunum at koma út at røra seg. Eisini er hetta eitt átak, sum bæði skal skipa fyri innanhýsis samanhaldi í stovnunum, og so eisini millum stovnarnar.

- Aftaná upphitingina verður kapprenning millum stovnarnar. Og tað eru ikki bara børnini, sum skulu renna kapp, men starvsfólkini skulu eisini verða við í hesum. So eru vit so heppin, at vit hava fingið eina avtalu í lag við Angelu og Hannibal, soleiðs at tey eru vinningurin. Ætlanin er so at tann stovnurin, sum vinnur kapprenningina, fær Angelu og Hannibal á vitjan. Hetta er ætlað fyri at skapa samanhald í stovnunum, soleiðs at tey føla at tey eru ein stovnur, men eisini fyri at skapa samanhald millum dagstovnarnar á Argjum sum heild, vísir Majbritt Jacobsen á.

Tað merktist á børnunum, at tey vóru sera spent uppá tiltakið og at tey eisini vóru við uppá tað. Har var sera góður stemningur, og børnini smíltu uppum bæði oyru tá tey fóru í gongd við at hita upp.

Soleiðs hava dagstovnarnir skipa fyri einum heilsuátaki, sum bæði skapar glað og sunn børn og starvsfólk, men eisini skapar gott samanhald millum stovnarnar.



